# B36 dámar betur útivøllin

**Toftamenn hava nú møguleikan at skræða seg heilt leysar úr botninum, men tað verður trupult móti b36, sum stendur seg væl betri úti enn CONTACT _Con-3F7C24A5E5 \c \s \l heima**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum vera man er lagið fínt á Toftum, eftir at teir fóru úr Klaksvík við øllum stigunum seinasta sunnudag. Sigurin gav nakað av andarúmi niður til hóttandi strikuna, og ein sigur sunnudagin kann lyfta teir heilt úr akutta vandanum.

Størsta ivamálið hjá B68 er, hvørt Arnbjørn Danielsen verður tøkur til dystin. Hann hevur verið skaddur í nakrar vikur, men seinastu vikuna hevur hann vant við fullari ferð. So er spurningurin, hvørt hann aftur verður partur av miðverjuni, har Kári Hansen hevur verið fínur vikarur, ella um hann verður nýttur aðra staðni á vøllinum.

Hjá B36 er talan um at kalla sama fólk, sum fyri viku síðani spældu javnt á heimavølli móti VB/Sumba. Eitt úrslit, sum als ikki var nøktandi hjá føroyameistarunum, men sum tó sýndi, hvussu trupult teir hava havt tað á heimavølli í ár. Hóast B36 enn ikki hevur tapt heimadyst í ár, so hava teir bert vunnið tann eina av slagnum – júst móti B68.

Hinvegin hevur úrtøkan á útivølli verið góð. Har hevu B36 higarti vunnið fýra av seks dystum, meðan teir tvær ferðir eru farnir av vølli sum taparar.

# Rógvi fekk fult

**KR tykist vera í legu, har teir vinna aðru hvørja ferð og tapa aðru hvørja ferð**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í morgin, leygardagin 17. juni, er tjóðardagur í Íslandi. Hóskvøldið vórðu fleiri dystir spældir í 7. umfari í landskappingini.

KR, sum tykist vera komið í rillu, har teir tapa aðru hvørja ferð og vinna aðru hvørja ferð, hevði vitjan av Víkingi, sum eisini er úr Reykjavík. Mánakvøldið tapti KR 2-0 í Vestmannaoyggjum. Hóskvøldið høvdu teir leikliga yvirvág, men tað gekk illa at fáa mál. At enda eydnaðist tað. Vísarin var farin ein minutt út um vanligu leiktíðina, tá ið teir skoraði sigursmálið til 1-0.

Rógvi Jacobsen var alla tíðina í KR álopinum. Eftir dystin undraðust KR menn um, at dómarin ikki hevði bríkslað fyri brotssparki og reyðum korti til málverjan hjá Víkingi, tí hann skuldi hava hevnt seg inn á Rógva Jacobsen.

Símun Samuelsen og Keflavík taptu mánakvøldið 2-1 á útivølli móti Fylkiri. KR er nummar trý við tólv stigum, og Keflavík er nummar sjey við sjey stigum. Meistararnir í FH eru á odda við 19 stigum, og Fylkir er næstfremst við 12 stigum.

# Strævnir HB-dagar

Sunnudagin kl. 17 spælir HB fyrra dystin móti lettiska FC Dianburg í Intertoto-kappingini.

Fríggjadagin fer ferðalagið hjá HB av landinum, og er hetta samstundis bara byrjanin til nakrar sera strævnar vikur hjá liðnum.

Mikudagin spældu teir oddadyst móti GÍ, og komandi mikudag verður aftur trupul dystur á skránni, tá teir spæla í Klaksvík.

Síðani er heimadysturin ímóti lettiska liðnum á skránni, grannauppgerð móti B36 og kanska eisini fjórðingsfinala í steypakappingini.

So alt í alt bendir kalendarin á nakrar sera strævnar vikur hjá bæði spælarum og venjara.

**-mørk**

# Nú er Christian í Premier League



Christian Restorff Mouritsen skrivaði herfyri undir veruligan yrkissáttmála við enska Manchester City, har hann hevur spælt seinasta hálva annað árið.

Ætlanin var alla tíðina, at lærusáttmálin, sum Christian hevur havt, skuldi broytast til veruligan Premier League sáttmála, og nú aldurin er til tað, er hetta veruleiki.

-mørk

# Kappríðing við Leynarvatn

Leygardagin klokkan 15 verður kappríðing við Leynarvatn. 36 ross taka lut í kappingini, sum fevnir um trav, tvíspor, tvíspor ung, tvíspor 2. flokkur og tvíspor 1. flokkur.

Av rossunum, sum eru við, høvdu Lokkur og Sólvindur, sum Rólant Reinert og Marita Askham eiga, bestu tíðirnar í fjør, og spennandi verður at vita, hvørt hesi megna at halda fast um oddasessir sínar.

**-mørk**

# NSÍ skal seta lit á stevnuna

**Skálamenn eru so mikið væl fyri við fólki, sum teir ikki hava verið fyrr í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Stevnudysturin verður í Runavík leygardagin klokkan 18.30. Optimala fyritreytin fyri góðum stevnuhýri hjá Eystanstevnu vertunum hevði verið, um NSÍ hevði fingið trý stig eftir, at Eysturoyingur hevði vunnið kappróðurin millum 10-mannaførini.

Skála tapti sunnudagin 1-0 á heimavølli móti HB. Skála hevði bóltin største partin av tíðini, men tað gekk illa at spæla seg til málmøguleikar. Tað kann hugsast, at fyritreytirnar verða øðrvísi hjá Skála leygarkvøldið, tá ið NSÍ fer at leypa á.

Á Skála eru teir manningarliga betri fyri, enn teir hava verið leingi. Einasta ivamálið er Pætur Dam Jacobsen, sum í vikuni hevur havt trupulleikar við øðrum knænum. Alexandur Johansen varð skiftur inn móti HB. Hann venur saman við hinum, og tað kann væl hugsast, at hann hesa ferð fer at fáa uppaftur meiri spælitíð.

NSÍ tók við 3-2 heimasigri móti EB/Streymi stórt fet fram móti toppinum. NSÍ hevur fingið fulla úrtøku burtur úr fimm teimum seinastu heimadystunum. Teir hava einki mist á heimavølli, síðani tað í triðja umfari 13. apríl endaði 1-1, tá ið B68 vitjaði.

Móti EB/Streymi sást, at tað er kapping um plássini. Einar Hansen, Bogi Løkin og Jústinus R. Hansen stóðu seg væl. Dánial Hansen og Helgi L. Petersen vóru ikki við, og Andy Olsen varð skiftur inn í 2. hálvleiki.



*Enn hevur Skála ongan tíð koppað NSÍ, tá spælt hevur verið í Runavík. Og vertirnir vilja helst treyðugt, at fyrsta ferðin í so máta skal vera á eystanstevnuni*

# Fleiri ivamál í Klaksvík

**Fuglfirðingar hava gott mót, eftir at tað eydnaðist teimum at fáa stig á útivølli móti oddaliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fuglfirðingar vóru væl nøgdir við teirra avrik í 12. umfari, meðan klaksvíkingar vóru minni væl nøgdir við teirra avrik. ÍF spældi 1-1 í Gøtu, og tað var fyrsta stigið hjá teimum á útivølli móti grannunum síðani í 1980. At talan var um fínt úrslit varð undirstrikað mikukvøldið, tá ið GÍ við sigri í Gundadali setti seg á oddasessin.

KÍ tapti 3-1 á heimavølli móti B68, og burtursæð frá stórsigrinum í Vági 2. hvítusunnudag hevur KÍ ikki vunnið síðani 30. apríl, tá ið teir vunnu 4-0 á Toftum.

Í Klaksvík eru fleiri ivamál undan ferðini til Fuglafirðar.

Tað er heilt víst, at Iulian Florescu ikki verður við í Fuglafirði. Hann hevur lítið seinastu vikurnar og ikki spælt, tí hann hevur verið skaddur. Tað tykist vera rættuliga ivasamt, um hann yvirhøvur fer at halda fram í Klaksvík.

Atli Danielsen hevur ikki vant saman við hinum í vikuni, tí hann hevur trupulleikar í øðrum knænum. Sinisa Jovevic hevur vant fyri seg sjálvan, og Christian Lundberg, sum kom til Klaksvíkar mándagin, var ikki førur fyri at venja fyrrenn hóskvøldið. Tá vandi Símun Joensen ikki, tí hann hevði trupulleikar við knænum.

Í Fuglafirði er Árni Petersen leikbannaður eftir reyða kortið í Gøtu. Fritleif í Lambanum var orsaka av fótskaða ikki við í Gøtu síðsta sunnudag. Hann verður ivaleyst aftur í miðverjuni.

Móti GÍ spældi ein av klaksvíkingunum í ÍF, Tórður Lervig, vinstri vongverji. Tað tykist sannlíkt, at hann verður afturvaldur móti vinmonnunum í barndómsfelagnum.

Tað verður framvegis arbeitt við at fáa tveir serbar – ein verjuspælara og ein álopsspælarar – til Fuglafirðar at hjálpa til. Enn duga teir ikki at siga, nær teir koma henda vegin.

Í 4. umfari 17. apríl vann KÍ eftir tógvið stríð 3-2 í Fuglafirði.

**formuladeildin**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 13 | 7 | - | 5 | - | 1 | 21 | 11 | 10 | 26 |
| 2 | HB | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 24 |
| 3 | EB/S | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 25 | 15 | 10 | 24 |
| 4 | NSÍ | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 25 | 16 | 9 | 21 |
| 5 | KÍ | 12 | 5 | - | 5 | - | 2 | 26 | 14 | 12 | 20 |
| 6 | B36 | 12 | 5 | - | 5 | - | 2 | 16 | 13 | 3 | 20 |
| 7 | Skála | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 14 | 14 | 0 | 11 |
| 8 | B68 | 12 | 2 | - | 2 | - | 8 | 11 | 21 | -10 | 8 |
| 9 | ÍF | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 13 | 31 | -18 | 7 |
| 10 | VB/S | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 12 | 41 | -29 | 7 |

**1. deild menn**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B71 | 12 | 9 | - | 2 | - | 1 | 60 | 12 | 48 | 29 |
| 2 | AB | 12 | 9 | - | 1 | - | 2 | 28 | 12 | 16 | 28 |
| 3 | LÍF | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 28 | 12 | 16 | 24 |
| 4 | FSV04 | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 29 | 13 | 16 | 22 |
| 5 | TB | 12 | 5 | - | 3 | - | 4 | 19 | 21 | -2 | 18 |
| 6 | HB | 12 | 5 | - | 2 | - | 5 | 35 | 28 | 7 | 17 |
| 7 | SÍ | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 35 | 33 | 2 | 16 |
| 8 | KÍ | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 24 | 41 | -17 | 13 |
| 9 | VB/S | 12 | 2 | - | 0 | - | 10 | 10 | 51 | -41 | 6 |
| 10 | Royn | 12 | 0 | - | 0 | - | 12 | 5 | 50 | -45 | 0 |

**1. deild kvinnur**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 10 | 10 | - | 0 | - | 0 | 63 | 9 | 54 | 30 |
| 2 | AB | 10 | 6 | - | 1 | - | 3 | 20 | 11 | 9 | 19 |
| 3 | **B36** | 10 | 6 | - | 1 | - | 3 | 24 | 16 | 8 | 19 |
| 4 | GÍ | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 30 | 20 | 10 | 16 |
| 5 | EB/S | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 12 | 11 | 1 | 15 |
| 6 | **SÍ** | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 10 | 23 | -13 | 6 |
| 7 | NSÍ | 10 | 2 | - | 1 | - | 7 | 19 | 36 | -17 | 7 |
| 8 | **HB** | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 5 | 59 | -54 | 3 |